HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

27. februar 2017
Mál: 16/00273

**Løgtingsmál nr. F-X/2016: Frágreiðing sambært § 51, stk. 4 í tingskipanini um Menningarætlan fyri sjúkrahúsverkið**

**Frágreiðing**

**til**

**aðalorðaskiftis**

Landsstýriskvinnan í heilsu- og innlendismálum leggur við hesum Menningarætlan fyri sjúkrahúsverkið til aðalorðaskiftis.

**Harra formaður!**

Beint fyri summarfrítíðina fekk eg sum landsstýriskvinna handað Menningarætlanina fyri sjúkrahúsverkið. Menningarætlanin er eitt úrslit av einari tilgongd, sum politiska skipanin hevur umbiðið og sett í verk, og har fleiri enn 50 fakfólk hava luttikið.

Í Menningarætlanini eru heili 25 tilmælir til politisku skipanina, og hava hesi tilmæli verið grundarlagið fyri einari røð av fundum, ið hava verið ímillum undirritaðu og umboð fyri politisku flokkarnar á Tingi, umframt uttanflokkatingkvinnuna. Seinastu vikurnar havi eg somuleiðis haft fleiri fundir við leiðslurnar á teimum trimum sjúkrahúsunum.

**Harra formaður!**

Eg eri nú til reiðar at leggja fram mínar framtíðarætlanir fyri Føroyska sjúkrahúsverkið, og vóni eg, at vit fáa eitt gott og gevandi orðaskifti um hesa sera týdningarmiklu tænastu, sum er ein av grundarsteinunum í okkara vælferðarsamfelagi.

Tað stóra arbeiðið, sum er gjørt av øllum fakfólkum, er ikki nógv vert, um tilmælini ikki síggjast aftur ítøkiliga í politikkinum.

Við hesum broytingum, sum nú verða lagdar fram, verður okkara sjúkrahúsverk framtíðartryggjað, og virksemið verður tryggjað á øllum trimum sjúkrahúsunum. Hetta fer samstundis at stuðla undir. at okkara sjúklingar - eisini frameftir, fáa eina dygdargóða tænastu.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

Í framløgu mínari fari eg at leggja serligan dent á trý høvuðsøki. Tey eru:

- Sjúkrahúsverkið, sum ein organisatión
- Uppgávubýtið, viðgerðir og raðfesting og
- Útvega, varðveita og menna heilsustarvsfólk (rekrutering)

**Harra formaður!**

Okkara sjúkrahúsverk er á mangan hátt frammarlaga vitanarliga og tøkniliga við nógvum dugnaligum starvsfólkum. Hetta er fortreytin fyri, at vit kunnu veita sjúklingunum eina dygdargóða tænastu. Eg ætli, at hetta framhaldandi skal vera galdandi. Tí fari eg undir at seta tiltøk í verk, ið skapa karmar fyri, at sjúkrahúsverkið mennir seg tíðarhóskandi, soleiðis at støðið bæði verður varðveitt, ment og tillagað framtíðina.

Eitt hitt fyrsta, sum eg ætli at fara undir, er at skipa sjúkrahúsverkið sum ein organisatión, og at greitt uppgávubýti verður millum fysisku eindirnar í organisatiónini. Her undir at fáa felags visitatión og felags bíðilistar. Somuleiðis verður farið undir eitt miðvíst arbeiði við útvegan av starvsfólki (rekrutering).

Tað er mín greiða fatan av tí, sum mær er handað, at ein fortreyt fyri nógvum av tilmælunum í menningarætlanini er, at sjúkrahúsverkið er skipað sum ein organisatión. Tí er málið hjá mær sum landsstýriskvinna, at sjúkrahúsverkið frameftir verður skipað á henda hátt.

Hetta merkir ítøkiliga, at í seinasta lagi 1. januar 2018 er settur ein ovasti leiðari fyri sjúkrahúsverkið, sum saman við lokalu staðbundnu leiðslunum koma at mynda framtíðar leiðsluna í sjúkrahúsverkinum.

Við áliti og virðing fyri øllum pørtum, verður framhaldandi tørvur á at hava lokalar leiðslur á staðnum, men tær leiðslurnar verða eisini partur av samlaðu sjúkrahúsleiðsluni. Hetta merkir, at lokalu leiðslurnar á øllum sjúkrahúsunum hava eina felags ábyrgd fyri virkseminum í samlaða sjúkrahúsverkinum.

Soleiðis fær framtíðar sjúkrahúsleiðsla ábyrgdina av at leggja til rættis viðgerðir og tænastur tvørtur um sjúkrahúsini, soleiðis at samlaða tilfeingið í sjúkrahúsverkinum verður nýtt so skilagott sum gjørligt. Tað vil við øðrum orðum siga, at leiðslan hevur myndugleika til – innan fyri karmarnar í sjúkrahúslógini og teimum kørmum, sum politiska skipanin setir – at skipa funktiónirnar upp á tvørs av sjúkrahúsunum.

Hetta er í høvuðsheitinum í samsvar við tey tilmælir, sum Menningarætlanin kemur við.

**Harra formaður!**

Tað er og hevur alla tíðina verið púra greitt, at sjúkrahúsviðgerð framhaldandi skal veitast á øllum trimum sjúkrahúsum, og soleiðis verður tað eisini. Hinvegin er endamálið at skipa og samskipa arbeiðið enn betur, enn tað verður gjørt i dag.

Tað er mín greiða fatan, at vit á henda hátt fáa sjúkrahúsini í nógv størri mun at virka sum eina samanhangandi virkisliga eind, sum samstarvar í øllum lutum fyri at veita sjúklinginum bestu tænastuna. Vit mugu ikki gloyma, at tað er fólkið í hesum landi, sum vit øll ynskja skulu fáa tænastu á støði við tænasturnar í teimum londum, vit vanliga samanbera okkum við. Samstundis er tilfeingið avmarkað, bæði starvsfólk og pengar, og eiga vit at fara skynsamt um okkara tilfeingið okkara borgarum at frama.

Við hesi samskipan verða felags bíðilistar og felags visitatión ein natúrligur partur av dagligdegnum í organisatiónini. Samskipan og samstarv á leiðslu- og deildarstigi verður natúrligt. Læknafakliga- og heilsufakliga samstarvið verður somuleiðis natúrligt, og somu krøv verða sett til viðgerðartrygd, dygd og tænastu í allari organisatiónini.

Eg eri greið yvir, at hetta er eitt stórt mál at seta sær. Tí verður farið varisliga til verka, har verandi leiðslur, starvsfólk og avvarðandi fakfeløg verða tikin í eið í mun til tær tilgongdir, sum ætlanin er at seta í verk.

**Harra formaður!**

Eftir at hava viðgjørt uppgávubýtið, viðgerðir og raðfesting við sjúkrahúsleiðslurnar við atlit til Menningarætlanina, eri eg komin til eina niðurstøðu um, hvussu býtið í høvuðsheitum skal verða frameftir.

Í mínum hugaheimi er og verður **Landssjúkrahúsið** akuttsjúkrahús fyri alt landið. Hetta merkir, at allir akuttir kirurgiskir tilburðir skulu sum útgangsstøði gerast á Landssjúkrahúsinum. Somuleiðis skulu tær viðgerðir av akuttum medisinskum tilburðum, sum einans kunnu viðgerast optimalt á Landssjúkrahúsinum, gerast á Landssjúkrahúsinum. Harumframt skulu fleiri serlæknaøki savnast á Landssjúkrahúsinum. Hinvegin skulu fleiri smærri planlagdar skurðviðgerðir flytast út á hini sjúkrahúsini.

Hetta setur krøv til, at Sjúkraflutningstænastan í Føroyum hevur neyðugan tólbúnað, og at starvsfólkini hjá Sjúkraflutningstænastuni runt um í landinum eru væl útbúgvin; minst á støði við londini rundan um okkum, sum vit samanbera okkum við.

Gransking og útbúgving fer í høvuðsheitum fram á Landssjúkrahúsinum, men av tí, at ætlanin verður at leggja alt sjúkrahúsverkið saman í eina organisatión, verður eisini møguligt at skipa soleiðis fyri, at partar av útbúgvingini kunnu fara fram á hinum báðu sjúkrahúsunum. Hetta verður sjálvsagt gjørt undir leiðslu av ábyrgdarhavandi serfrøði. Tá fleiri smærri skurðviðgerðir verða fluttar av Landssjúkrahúsinum, kunnu til dømis læknar í útbúgvingarstørvum fylgja við og viðgera á Klaksvíkar sjúkrahúsi ella Suðuroyar sjúkrahúsi undir leiðslu av ábyrgdarhavandi serfrøði. Tá talan er um eina organisatión, er eisini talan um eitt og sama útbúgvingarstað. Hetta er ein av fleiri fyrimunum.

Ein annar fyrimunur er, at tað verður størri møguleiki fyri og meira natúrligt, at starvsfólk innan allar starvsfólkabólkar kunnu flyta ímillum sjúkrahúsini at arbeiða eftir tørvi, og á tann hátt førleikamenna seg til gangs fyri tænastustøðið til sjúklingin.

Ætlanin er, at eitt sálarfrøðiligt toymið verður skipað á Landssjúkrahúsinum, sum kann veita heilsu-, kreppu- og neurosálarfrøði. Toymið skal vera tvørgangandi og skal veita tænastur til sjúklingar í allari organisatiónini eftir tørvi. Eisini skal toymið hava til uppgávu at undirvísa øðrum fakbólkum um tað sálarfrøðiliga økið.

Ætlanin er somuleiðis, at endurvenjingin á Landssjúkrahúsinum verður styrkt og ment við at seta fleiri fysioterapeutar, ergoterapeutar og onnur heilsustarvsfólk í starv, sum eru natúrligur partur av einum vælkvalifiseraðum toymi í endurvenjingini innan sjúkrahúsøkið. Akutt endurvenjing á serkønum stigi fer sum útgangsstøði fram á Landssjúkrahúsinum.

Serstøk játtan er í ár sett av á fíggjarlógini til at seta fleiri serlæknar og onnur heilsustarvsfólk í starv í føroyska sjúkrahúsverkinum. Eg vóni, at vit tey næstu fýra árini fáa hækkað játtanina til upp í 20 mió. krónur um árið. Hetta merkir, at serstaka játtanin má økjast við 5 mió. krónum um árið. Við hesum verður møguligt at víðka um serlæknaøkið í sjúkrahúsverkinum soleiðis, at fleiri viðgerðir kunnu bjóðast samstundis, sum vaktarbyrðan ikki verður eins tung sum í dag. Ein játtan ger tó einki einsamalt, tí skal fokus samstundis setast á arbeiðið at útvega, varðveita og menna heilsustarvsfólk. Hetta komið eg nærri inn á.

**Klaksvíkar sjúkrahús** verður framhaldandi lokalsjúkrahús fyri Norðoyggjar og partvís Eysturoynna og lokalt akuttsjúkrahús. Hetta merkir, at greiðar leiðreglur eru fyri, hvat akutt kann gerast á sjúkrahúsinum í Klaksvík, og hvat verður gjørt aðrastaðni.

Umframt verandi virksemið, skal sjúkrahúsið fremja fleiri smærri skurðviðgerðir, sokallaðar "samadagskirurgi", har sjúklingurin verður útskrivaður sama dag, sum hann er innskrivaður. Her verður millum annað hugsað um brokkskurviðgerðir og æðraknútar við meira. Somuleiðis verður planløgd ortopedkirurgi á sjúkrahúsinum.

Eisini verður umhugsað at fáa framt enn fleiri kikarakanningar (endoskopiir) á sjúkrahúsinum. Hetta merkir, at nakrar av hesum viðgerðum, sum í dag fara fram á Landssjúkrahúsinum, fara fram á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

Harumframt skal setast á stovn miðstøð innan endurvenjing, sum fer at taka sær av at endurvenja sjúklingar við seinheilaskaða og ryggmergskaða. Hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við serfrøðingamiðstøð í Danmark. Hetta verður framt soleiðis, at tann akutti parturin fer fram í Danmark, meðan sjúklingarnir síðani verða fluttir á Klaksvíkar sjúkrahús í einum samstarvi millum partarnar. So hvørt sum okkara serfrøði mennist, verða sjúklingarnir styttri og styttri tíðarskeið uttanlands. Tað er somuleiðis eisini hugsanin, at sjúklingar verða fluttir frá Landssjúkrahúsinum til miðstøðina, tá tørvur er á tí.

Eisini ætli eg, at Kommunulæknaskipanin 1870 í Norðurøkinum skal samskipast við Klaksvíkar sjúkrahús á sama hátt, sum hetta er gjørt á Suðuroyar sjúkrahúsi.

Ætlanin er ikki at fremja broytingar í akuttu tilbúgvingini á Klaksvíkar sjúkrahúsi.

**Suðuroyar sjúkrahús** verður framhaldandi lokalsjúkrahús fyri Suðuroynna við eini styrktari akuttari tilbúgving.

Umframt verandi virksemi skal sjúkrahúsið fremja fleiri smærri skurðviðgerðir, sokallaðar "samadagskirurgi" har sjúklingurin verður útskrivaður sama dag, sum hann er innskrivaður. Her verður millum annað hugsað um urologiskar viðgerðir brokkskurviðgerðir, æðraknútar og sterilsatión v.m. Eisini skulu fremjast fleiri smærri planlagdar skurðviðgerðir.

Eisini verður umhugsað, at enn fleiri kikarakanningar (endoskopiir) verða framdar á sjúkrahúsinum.

Harumframt skal pínuviðgerð bjóðast á Suðuroyar sjúkrahúsi, soleiðis at tann parturin, sum í dag verður sendur uttanlands, í størri mun kann fara fram í Suðuroy.

Somuleiðis er ætlanin at varðveita og styrkja ta hjartarehabilitering, sum er í dag á sjúkrahúsinum, og at hetta við tíðini verður partur av eini skipaðari hjartarehabilitering í einum toymi, sum virkar fyri alt landið.

Tilboðið um endurvenjing verður víðkað á Suðuroyar sjúkrahúsi til at fevna um sjúklingar úr øllum landinum. Hetta verður gjørt soleiðis, at Suðuroyar sjúkrahús bjóðar uppihald við endurvenjingum til sjúklingar við KOL, krabbamein, gikt og øðrum kroniskum sjúkum. Harumframt er og verður framhaldandi veitt endurvenjing til sjúklingar, sum hava fingið framt ymsar skurviðgerðir.

**Harra formaður!**

At útvega, varðveita og menna heilsustarvsfólk er eitt av høvuðsøkinum í Menningarætlanini, og er tað eisini eitt øki, sum eg leggi dent á sum landsstýriskvinna.

Tilgongdin við at seta læknar og onnur starvsfólk er longu byrjað í sambandi við, at serstøk játtan er sett av til endamálið, sum áður nevnt. Somuleiðis verður tørvur á at gera greiningar og framrokningar um framtíðar starvsfólkatørv, sum kann nýtast sum eitt amboð til eina strategiska útveganar- og førleikaráðlegging á sjúkrahúsunum. Fyri at kunna røkja omanfyrinevndu uppgávur, er neyðugt at hava eina tilfeingissterka starvsfólkadeild, sum skal virka tvørtur um sjúkrahúsini. Starvsfólkadeildin skal vera tvørgangandi og virka fyri alt sjúkrahúsverkið. Hetta er ein fortreyt. Við einari organisatión verður ein starvsfólkadeild ein natúrligur partur av organisatiónini, og tað verður upp til leiðsluna at skipa seg skynsamt, fyri at røkka málinum um at hava nøktandi og vælkvalifiseraða starvsfólkaorku í sjúkrahúsverkinum.

Í Menningarætlanini verður víst til altjóða gransking og royndir sum vísa, at tað serliga eru trý viðurskifti, sum eru serliga avgerandi, fyri at fáa til vega og fasthalda heilsustarvsfólkum í útjaðaraøkjum sum t.d. Íslandi, Skotlandi og Norðurnoreg.

- Tað fremsta er at satsa upp á fólk, sum eru vaksin upp í økinum, og
- at fólkini hava fingið jaligar kliniskar og útbúgvingarligar royndir í økinum, sum ein part av útbúgvingini og
- eina málrættaða útbúgving í útjaðaraøkinum aftan á kandidatútbúgving.

Tí má útgangsstøðið fyri útvegan fyrst og fremst vera at satsa upp á væl skikkaðar føroyingar, og at í minsta lagi ein partur av útbúgvingini verður boðin heima í Føroyum. Tess longur føroysk lesandi eru í Føroyum undir útbúgving, tess størri er møguleikin fyri, at tey koma aftur at arbeiða í føroyska heilsuverkinum, tá ið tey eru liðug at læra.

Bestu dømini eru tey føroysku lesandi innan sjúkrarøktarfrøði og heilsurøkt, sum so at siga øll starvast í Føroyum eftir loknan lestur, tí skipað útbúgving er í Føroyum. Øðrvísi er við serlæknum og læknum, ið ikki kunnu taka útbúgvingin heima í Føroyum. Tí er neyðugt, at tiltøk vera sett í verk, sum stuðla undir at vaksa um ta tíð, ein serlækni er undir útbúgving í Føroyum.

Hetta fer at økja um sannlíkindini fyri, at fleiri velja at koma heim í føroyska sjúkrahúsverkið at arbeiða seinni.

Útbúgving er tó ikki alt. Onnur viðurskifti eru eisini týðandi fyri, at eitt arbeiðspláss virkar dragandi. Frægasti ambassadørurin fyri okkara sjúkrahúsverk, umframt sjúklingurin, eru helst tey, sum longu starvast á sjúkrahúsunum. Hetta er kanska serliga týðandi, tá viðurskiftini eru smá sum í Føroyum. Trívast fólk ikki, er trupult at draga onnur til. Er umdømið vánaligt, er trupult at útvega nýggj starvsfólk og at varðveita tey sum eru.

Tí er sjálvandi eisini neyðugt tilvitað at hjúkla um tey, sum longu starvast í verkinum, við miðvísum arbeiði við menning av tí einstaka og trivnað í heila tikið. Í mun til umdømið hevur tað eisini týdning, at tey, ið longu eru í starvi, eru við til at byggja upp eina jaliga mynd av sjúkrahúsverkinum.

**Harra formaður!**

Fyri at málrætta útvegan av høgt spesialiseraðum læknum og øðrum høgt spesialiseraðum heilsustarvsfólki til sjúkrahúsverkið, er eisini týdningarmikið at hava í huga, hvørjar viðgerðir vit so ikki bjóða í Føroyum.

Tað er mín fatan, at vit eiga at stremba eftir at fáa so nógvar viðgerðir heim til Føroya sum til ber. Tað er sjálvsagt undantøk, tí nøkur serliga høgt spesialiseraði serøki eru ikki ráðilig at bjóða í Føroyum í nærmastu framtíð. Sambært menningarætlanini er hetta innan skurðøkið, skurðviðgerðir í heilanum (neurokirugi) skurviðgerðir í bróstkassanum (thoraxkirurgi) og skurviðgerðir í hjartanum (hjartakirurgi). Afturat hesum eru skurviðgerðir fyri illkynjaðar sjúkur, sonevndar malignar sjúkur – undantikið viðgerðir fyri krabbamein í langanum (colon), sum ber til at gera í Føroyum.

Aftrat hesum eru eisini serliga spesialiseraðar ryggskurðviðgerðir, ið neyvan eiga at verða gjørdar í Føroyum. Hinvegin verður mett, at innan medisinskar viðgerðir kann meginparturin gerast í Føroyum.

Neyðugt er við røttu serfrøðini fyri at bjóða viðgerðir. Tað merkir, at óloysiligt samband er ímillum ta sergrein, sjúkrahúsverkið bjóðar og teir serlæknar, ið eru tøkir. Uttan serlækna og onnur serkøn heilsustarvsfólk ber ikki til at veita viðgerðina.

**Harra formaður!**

Hetta er eitt aðalorðaskifti um sjúkrahúsverkið og ikki alt heilsuverkið. Ein grundleggjandi skipan, sum eisini er ein fortreyt fyri, at arbeiðið á sjúkrahúsunum gongur skynsamt, er ein vælvirkandi kommunulæknaskipan. Ja, í heila tikið ein vælvirkandi primer sektor við kommunulæknum, og aðrari heilsurøkt í nærumhvørvinum. Hetta eri eg greið yvir, og er tað næsta stigið at seta arbeiðið í verk at menna kommunulæknaskipanina og heilsutænastuna í nærumhvørvinum.

**Harra formaður!**

Snávingarsteinar eru á øllum leiðum, og allar broytingar krevja dirvi av leiðslum, starvsfólki og ikki minst av politisku skipanini. Eg ynski, at vit nú seta eina striku í sandin og fara undir eina nýggja byrjan fyri okkara sjúkrahúsverk. Eina tilgongd at fáa sjúkrahúsverkinum ein nýggjan samleika. Tað hevur eftir mínari metan týdning fyri sjúkrahúsverkið, at tað verður ein felags samleiki fyri alt sjúkrahúsverkið, har útgangsstøðið er, at øll broyta navn til eitt felags nýtt navn fyri alt verkið.

**Harra formaður!**

Vit skulu í fremstu røð, tað nyttar ikki at stinga høvdið í sandin. Lat okkum tora at taka neyðugu stigini.

Eg eri sannførd um, at vit við hesari ætlan røkka málunum við Menningarætlanini, sum politiska skipanin hevur sett í verk fyri at framtíðartryggja okkara sjúkrahúsverk og at tryggja, at alt tilfeingið í sjúkrahúsverkinum verður nýtt til fulnar.

Við ynski enn einaferð um eitt gott aðalorðaskifti.

Takk fyri, harra formaður!

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna

/ Turid Arge

**Fylgiskjal:**

- Menningarætlan fyri sjúkrahúsverkið